## DAGSINS MEINING

# Limaskapur aftur á beint

Ikki hevur enn verið tað nógva orðaskiftið í kjalarvørrinum á teimum seinastu hendingunum í Norðurlandaráðnum um sjálvstøðugan føroyskan limaskap. Í blaðnum í gjár ger m.a. eitt av løgtingsumboðunum í ráðnum, formaður Javnaðfloksins sínar viðmerking til gongdina í hesum máli. Tað er neyvan nakar, sum ivast í, sum hann eisini ger vart við, at spurningurin um sjálvstøðugan føroyskan limaskap í Norðurlandaráðnum má fáast aftur á beint. Við hesum verður sipað til, at danski forsætisráðharrin hevur gjørt vart við, at grundlógin forðar fyri sjálvstøðugum limaskapi her og nú.

Alt bendir á, at Føroyar rúma tíð framyvir verða verandi undir danskari grundlóg, hóast Tvøroyrarskjalið í roynd og veru merkir, at mestsum øll málsøki gerast førosyk burturav. Hetta, at landsstýrið undir verandi statsrættarligu støðu søkir um fullan limaskap, kann tí bert merkja, at landsstýrið eisini hevur hesa áskoðan. Um ikki so var, hevði ein bíðað eftir fullveldinum. Málið um sjálvstøðugan føroyskan limaskap má loysast eftir øðrum leisti enn tí, sum landsstýrið hevur skorið. Hetta merkir, at farast má eftir broytingum í Helsinkiavtaluni. Helsinkiavtalan er ein avtala millum tey fimm norðurlondini um politiskt samstarv innan eina røð av økjum. Men avtalan er bert galdandi fyri suverenar statir. Spurningurin er, um hetta er rímiligt, soleiðis sum tjóðskaparliga politiska myndin sær út í Norðurlondum í dag við fimm suverenum statum og væl fleiri tjóðum. Her eru íslendingar, danir, sviar, normenn, finnar, álendingar, føroyingar, grønlendingar, samar, týskarar og ein hópur av etniskum minnilutum. Norðurlendsku kortini eiga at verða blandað av nýggjum.

Tað, sum landsstýrið tí eigur at gera, er at fáa sær undirtøku í uttanlandansnevndini fyri einum nýggjum diplomatiskum átaki. Hetta átakið eigur at miðja ímóti at fáa londini til at broyta Helsinkisáttmálan soleiðis, at allar norðurlendskar tjóðir kunnu gerast sjálvstøðugir limir í Norðurlandaráðnum, samstundis sum etniskir minnilutar fáa í minsta lagi eygleiðarastøðu. Hetta hevði kunnað loyst aktuella knútin. Hetta modellið hevði kunnað loyst ein tann størsta trupulleikan hjá Norðurlandaráðnum nevniliga spurningin um samisku umboðanina og spurningin um aðrar tjóðskaparligar og etniskar minnilutar. Landsstýrið eigur at venda sær til øll tey fimm stóru norðurlondini og vinna sær undirtøku fyri sínum rættvísiskravi. Í hesum máli eiga allir føroyingar stuðla landsstýrinum og tað fara teir ivaleyst eisini at gera.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fjaldar dagsskráir

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokkurin*



Ongin ivast í, at nógv gongur fyri seg í løtuni á politiska "verkstaðnum" hjá varaløgmanni, formanni Tjóðveldisfloksins, og Høgni Hoydal er sera produktivur maður, men hvat er tað, hann nú fæst viðð

Ja, langt er frá orði til gerð, tá vit minnast lyftini um opinleika, klokkuklárar mannagongdir o.s.fr. bert fyri at nevna einkult dømi, fyri ikki at tala um formaningarnar til aðrar flokkar móti útspilling, ið var so niðurbrótandi fyri samfelagið, tí vit onnur máttu vísa sakligheit !!

Sami maður smæðist ikki fyri samstundis at tosa niðurgerandi um "sambandsflokkarnar", har hann helst meinar við andstøðuna, ið samb. honum bidda pengar frá dønum at keypa sær atkvøður og vinir fyri!

Varamaður hansara smæðist heldur ikki fyri á røðarapalli Fólkatingsins at fortelja dønum um sínar egnu landsmenn, ið samb. honum selja seg fyri mammon !

**Opinleikin**
Opinleikan hava vit sæð sera lítið til seinastu tíðina, burtursæð frá nógv umrødda filmin um Høgna Hoydal, ið umsiting Høgna Hoydals hevði goldið fyri, fyrst við pengum frá Sjálvstýrisfyrisitingini og seinri frá Mentamálaráðnum, har Høgni Hoydal sjálvur sat. Hann hevur eisini harmast um, at leikstjórin (ið annars eigur rós uppiborið fyri sítt fakliga avrik ) ikki slapp við til tættastu samráðingarnar á sinni, tí so høvdu vit longu havt fullveldi.

At føroyingar samstundis sótu heima og onki máttu vita, tí alt var í trúnaði, tað harmar hann ikki.

**Yvirtøkulógin**
Nú má ongin heldur vita, hvat gongur fyri seg við nógv umrøddu yvirtøkulógini! Ja, tá er lættari aftaná at koma og siga, at danir eru ómøguligir og halda føroyingum fast við síni jarnhond !

Samstundis kann hann so berjast móti peningastovnunum og reka vinnupolitikk herheima, tí tað hevur hann maktina til, hóast sjálvt hansara egnu samstarvsfelagar høvdu málið til viðgerðar í nevnd. Hvat andstøðan meinti, hevur als ikki hansara áhuga.

Og hvør minnist ikki málið um navnalógina, sum honum ikki dámdi?

Varamaður hansara á Fólkatingi rekur fyri seg sjálvan og saman við Grønlandi føroyskan loysingarpolitikk, sum løgmaður onki veit um, og sum skal flyta okkum vestureftir, burtur frá Danmark.

Skal hetta halda fram? Ja, tað er upp til samgonguflokkar Tjóðveldisfloksins.

Alt meðan Høgni Hoydal á verkstaðnum smíðar fjaldar dagsskráir, tí tað er helst tað hann fæst við.

Fólkið kann bert gita, tí tey fáa onki at vita.

# Onkur má steðga manninum

**Finnleif Guttesen**
*býráðslimur á Tvøroyri*



Verandi uppskot og tíðarfreist, at leggja barnaverndarøkið út á kommunurnar, er tann reini ørskapur.

**Undirtøkan av uppskotinum er ikki stór.**
Føroya kommunufelag sigur, at tølini í uppskotinum eru ikki nøktandi fyri at gera sær eina rætta meting av, hvat økið kostar í dag og frameftir.

Kommunusamskipan Føroya sigur, at tann fíggjarligi parturin er sera ógreiður og tekur ikki undir við uppskotinum, áðrenn greið semja er fingin um fíggingina, og full semja er millum land og kommunur um fíggjarliga leistin.

Løgmálaráði mælir til, at lógaruppskotið ikki verður sett í gildi, fyrr enn kommunurnar hava havt tíð til at laga seg eftir broytingunum í uppskotinum.

Almannastovan, heilsusystrar, og føroyskir sálarfrøðingar halda at barnaverndarøkið skal verða ein landsuppgáva.

**Vísur vøddar**
Landsstýrismaðurin er ikki førur fyri, at fáa eina semju við kommunurnar og sigur tí, at einki endamál er við framhaldandi royndum, tí máli skal avgreiðast áðrenn 1. januar 2004, sjálvt um tað kann raka og skaða børnini.

Hendan niðurstøðan vísur bert, hvussu maktgirndin hevur tikið yvirhond hjá landsstýrismanninum og tað kunnu vit bert harmast yvir og vera á varðhaldi fyri.

**Hundraðtals bý- og bygdaráðslimir**
Landsstýrismaðurin sigur at Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag ynsktu, at barnaverndarøkið skuldi verða kommunal uppgáva. Tað er stýrini,10-12 fólk, í hesum felagsskapum, sum hava fráboðað hetta ynski.

Eg yvist stórliga í, um teir hundrað tals bý og bygdaráðslimir, sum ikki eru í stýrinum fyri kommunufelgsskapinar, eru eftirspurd í hesum málið og taka undir við tí.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Ein samanbering í óføri

**Jóannes Eidesgaard**



**So komu teir allir kropp á kroppi - eitt úrvalslið av skilafólkum so sum spinn-doktarin á Christiansborg, rithøvundurin, fólkalívsfrøðingurin og uttan iva fleiri og ikki at gloyma nøkur av fjølmiðlafólkunum, sum heldur ikki skiltu boðskapin. Heldur enn at skilja samanberingina, sum brúkt varð, so valdu tey eina aðra samanbering, sum hóskaði teimum so væl, at hon kundi brúkast afturímóti. Knappliga sóu tey eitt høvi at negla ein ávísan politikkara til krossin. Ikki fyri tað, hon segði, men fyri tað, hon als ikki segði. Tí kom Ólavur Rasmussen í tøkum tíma við sínum íkasti til kjakið, sum sambært honum sjálvum var endað í einum gruggutum dunnuhyli. Uttan at vera samdur í øllum, hann skrivar, so eigur hann tøkk fyri at hava givið orðaskiftinum eitt neyðugt "lyft" rætta vegin.**

**Hvørji eru politisku amboðini?**
Í politikki er ikki so nógv amboð. Vit hava ikki ein fullan amboðskassa við øllum hugsandi amboðum. Vit hava bert "orðið". Vit hava talaða orðið, skrivaða orðið, og vit hava dagliga kjakið. Tí er tað so umráðandi, at orðini verða vald skilagott og við umhugsni. Tað ræður jú um at fáa onnur at taka undir við tí, tú sigur ella skrivar. Í so máta líkjast størvini, sum prestar og politikkarar hava. Amboðið hjá presti er monologurin og dialogurin millum hann og meinigheitina, og amboðið hjá okkum er monologurin og dialogurin millum okkum og veljararan.

Til tess at geva orðunum meira vekt, enn orðið í sær sjálvum hevur, so verða ymiskir hættir brúktir. Samanberingar og myndatala eru mest brúkt. Onkur oysir um seg við citatum frá kendum fólkum. Ymiskt er, hvussu hetta eydnast hjá okkum, men nakrir eru meistarar til slíkt. Eg plagi vanliga at siga, at bestu fortreytir fyri at kunnu sláa ígjøgnum í politiskum orðastríði hava fólk, sum kenna til Bíbliuna og kvæðini. Tí var tað ikki av tilvild, at Johan Nielsen var ein meistari til at frambera sín boðskap uttan mun til, um tað var í kirkju ella á politiskum fundi. Hann brúkti ofta myndir, sum vóru úr Halgubók ella úr einum kvæði.

**Krøv til móttakaran**
Men er røðan bygd upp um samanberingar ella myndir, so setur tað sjálvsagt eisini krøv til móttakaran. Hann má duga at skilja myndina og føra hann inn í dagsins veruleika. Uppaftur meira setur tað krøv, tá samanberingar verða gjørdar - at man ikki letur seg draga til síðis av samanberingini og letur hana einsamalla koma í fokus.

- "Samgongan stendur sum ryssa yvir deyðum fyli" merkir ikki, at samgongan er eitt ross, men at hon ikki kemur úr stað við einum máli .
- "Samgongan melur sum hundur um heitan greyt" merkir ikki, at samgongan er ein hundur, men at hon ikki torir at taka støðu til ávíst mál.

Hetta ljóðar kanska mest sum ein argumentatión hjá Erasmus Montanus, men tað er kanska neyðugt, tá hugsað verður um, hvørji íkøstini hava verið higartil.

**Aktuella málið hjá Katrin**
Katrin Dahl Jakobsen brúkti sína røðu um fíggjarlógina 2004 til at vísa á, at Tjóðveldisflokkurin og serliga Høgni Hoydal royndu at billa fólki ein falskan veruleika inn. Hann fyrigyklaði fólki ein bjartari veruleika enn tann, sum galdandi var. Veruleikin er bert tann eini, hóast ein samgonga og ein andstøða ivaleyst altíð vilja geva hvør sína útlegging av hesum veruleika. Tá sagt verður, at tað ongantíð áður hevur gingið so væl í føroyska samfelagnum, so má tað vera loyvt andstøðuni at mótmæla.

Hesa fyrigykling førdi hon so aftur í eitt søguligt perspektiv, har makthavarar hava brúkt somu metodu.

Til hetta brúkti hon eina samanbering við tað, sum Joseph Goebbels gjørdi, tá hann so meistarliga megnaði at halda vónina uppi hjá týska fólkinum. Goebbels, sum annars var dr. phil í søgu, varð útnevndur til propagandamálaráðharra, so hansara uppgáva var at fyrigykla fólki tann veruleika, at alt gekk so sára væl, hóast veruleikin var tann beint øvugti.

Henda samanbering hjá Katrini kann ongantíð útleggjast til, at hon hevur gjørt Høgna Hoydal til Hitler. Neyvan hevur hon so frætt sum hugsað um Hitler, tí tað var jú Goebbels, sum stýrdi týsku propagandaini. Tað kann tí vekja undran, at Hitler verður drigin fram í hesum sambandi og ikki Goebbels.

Katrin tosar um fyrigyklingina sum politikst snildi og so als ikki um tær hugsjónir, sum hasin bølmannaskarin stóð fyri. Hon tosar um politisku metoduna at fáa fólki eina aðra fatan av veruleikanum.

Men hon kundi havt brúkt so mong onnur dømi, enn tað hon brúkti.

Hon kundi brúkt kríggið í Iraq, har Bush og Blair hvør í sínum lagi royndu at billa fólki inn, at nú var avgjørt neyðugt at leypa á, tí Iraq hevði hópoyðingarvápn. Hetta hevur seinni víst seg als ikki at passa. Men tað hevði ikki merkt, at Høgni Hoydal politiskt er á linju við hvørki Bush ella Blair.

Hon kundi brúkt støðuna í gamla Sovjett, har Stalin tvingaði fólkið at trúgva einum følskum veruleika. Men tað hevði ikki merkt, at Høgni Hoydal er politiskt á linju við Stalin.

Men hon valdi at brúka tíðina í Týsklandi í 30´unum og fram til 1945, sum ivaleyst er tað mest ekstrema dømið um, at makthavarar fyrigykla fólki ein falskan veruleika. Men tað vil ongantíð verða tað sama sum at siga, at Tjóðveldisflokkurin ella Høgni Hoydal eru nazistar. Tann, sum fær slíkt burtur úr úttalilsinum hjá Katrin, er ikki komin longur enn Erasmus Montanus.

**Okkara samanbretsur í seinasta valstríðnum**
Ólavur skrivar í greinini, at eg skírdi hann fyri nazist á veljarafundinum í Sumba. Hetta er ikki rætt Ólavur, og tú gert teg her sekan í tí sama, sum aðrir í málinum hjá Katrini. Tú hevði í valstríðnum áður brúkt myndina um okkum javnaðarfólk, at vit vóru sum gleðisgentur. Ikki tann mest positiva samanberingin, men tú hugsaði ivaleyst um stuðulin úr danska ríkiskassanum. Síðani segði tú, at vit javnaðarfólk høvdu danskan buding í okkara æðrum. Kanska ein óskyldug mynd, men ikki fyri meg og enn minni fyri tann flokk, sum eg eri formaður fyri. Vit kenna okkum á allan hátt sum rættar føroyingar, og tín roynd var júst tann at geva fólki eina mynd av okkum sum nakrir hálvhjartaðir landsmenn.

Hetta gav mær so høvið til at siga, at hetta minti meg mest um ta tíðina í Miðeuropa í 30´árunum, tá makthavarar royndu at býta fólkið upp í tey røttu og so hini. Eg kundi havt sagt tey við budingi í æðrunum, og so hini við reinum føroyskum blóði. Men eg brúkti ongantíð orðið "nazisma" ella "nazist", hvørki um teg ella tín flokk - til tess havi eg verið ov leingi á politiska vígvøllinum. At tú gjørdist so sintur um mína samanbering hongur kanska saman við, at tú gjørdist illa við, at eg tók so harðliga til orðanna, tí ivaleyst vildi tú halda myndina upp í einum skemtiligum ljósi. Tú sigur, at onnur valevni flentu at tínari myndatalu, men eg haldi, at júst tá er ongantíð meira neyðugt at vera á varðhaldi.

Tú helt meg ivaleyst vera sera smásáran, men eg kann ikki góðtaka, at nakar setur spurning við rættin hjá okkum øllum at vera føroyingar, uttan mun til hvønn politiskan observans vit annars hava.

Annars haldi eg, at greinin hjá tær er góð. Tú livir upp til tað, eg hevði roknað við frá tær, tí eg haldi nógv av tær bæði sum menniskja og prædikumanni.

**Hví fór nú alt upp at góla?**
Eg eri samdur við Eyðuni Andreasen so langt, at tað liggur eisini ein stór ábyrgd á okkara redaktørum. Men eg sigi tað út frá tí sannroynd, at í hesum aktuella føri hava teir stuðlað undir, at ein rong mynd, varð send út. Tann rætta var kanska í seinasta enda ov triviell - hon gav ikki forsíðutilfarið og øsandi yvirkskriftirnar.

Eg haldi eisini tað liggur ein stór skylda á okkara redaktørum at mótmæla, tá óvirðiligar lýsingar verða brúktar. Vit minnast øll ræðuligu lýsingina dagin fyri løgtingsvalið av Høgna Hoydal sum tann ektaði føroyingurin og Jóannes Eidesgaard og Lisbeth L Petersen sum bastardarnir.

Eg haldi eisini, at tað liggur ein stór skylda á redaktørunum at mótmæla, tá lygnin verður brúkt. Vit minnast øll herrópini valdagin og dagin fyri um, at nú var oljan funnin.

Eg haldi eisini, at tað liggur ein stór skylda á redaktørunum at mótmæla, tá ókvæmisorð sum "landasvíkjari" og "quislingur" verða brúkt eisini av tingsins røðarapalli um politisk mótstøðufólk.

Men heldur ikki tá hoyrdist eitt kis, hvørki frá fjølmiðlum, spinn-doktarum, rithøvundum ella fólkalívsfrøðingum. Miinir meg mest um støðuna hjá Martin Niemöller, har eingin var eftir at mótmæla.

Tað er jú ikki ein spurningur um, hvør sendarin ella móttakarin er, men hvat innihaldið er - ella havi eg kanska misskilt alt????

P.S. Tað hevði verið eitt hugskot at farið oman á Meiaríið og sæð sjónleikin, sum gongur í hesum døgum. Meira aktuellur enn nakrantíð.

# Nú melur fyri Heðini

**Leivur Hansen**
*býráðslimur*



Tað liggur væl fyri hjá Heðini Mortensen, tá ið ræður um at snúgva sær undan nærgongdum spurningum.

Hetta er jánkasliga aftursvar hansara í gjár eitt frálíkt dømi um. Snøgt sagt ein slutur fyri ein slatur.

Nei, ikki fekk Leivur Hansen kaldar føtur, tá hann á býráðsfundi atkvøddi fyri uppskoti meirilutans um at lata Hallarstuðlar standa fyri bygginini av ítróttarhøllini í Kollafirði.

Tvinni uppskot lógu á borðinum at taka støðu til, og tá býráðið hevði felt uppskot mítt um, at kommunan sjálv skuldi byggja og reka høllina — eins og galdandi var fyri Hoyvíkshøllina — var ikki annað at gera enn í øðrum lagi at taka undir við "take-it-or-leave-it"-loysnini hjá meirilutanum.

Tit tosa um eina høll fyri góðar 13 milj. kr. Hvat er hetta fyri ein høll? Nær verður hon boðin út? Ella er ætlanin kanska ikki at bjóða hana út?

Tá Heðin heldur uppá, at eg havi góðtikið eitt "ynskiprojekt" frá kollfirðingum uppá 40 milj. kr., so er tað sjálvandi eisini púra burturvið.

Veruleikin er, at eg fleiri ferðir gjørdi táverandi bygdarrráðnum greitt, at byggikostnaðurin undir ongum umstøðum mátti fara uppum 20 milj. kr. - og har stóð málið, tá kommunurnar løgdu saman.

Spurningurin um stødd og kostnað var sostatt ikki loystur.

Heðin kallar uppskot mítt um, at kommunan sjálv byggir høllina, fyri eina lappaloysn. Hetta krevur eina nærri frágreiðing, harra Mortensen?

At enda proklamerar hann, at hann ikki bakkar frá givnum lyftum.

Nú haldi eg, at tað av álvara er farið at mala fyri Heðini, og tað munnu ivaleyst fleiri við mær nikka játtandi til.

Hevur hann td. gloymt, nær KÍF hevði 50-ára stovningardag?